# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Dagsins Russland er líka íðið eftir at njósnast ímóti okkum, sum gamla Sovjetsamveldið var*

*(Jonathan Evans)*

## Aftur eitt spor í Madeleine-málinum

**Portugisiska løgreglan hevur funnið hár, hvørs DNA eru átøk teimum hjá Madeleine McCann**

Løgreglan fann leivdir av húð og hári uppi á klæðum, sum lógu í einum posa, sum løgreglan fann við eitt møtipláss nærhendis flogvøllinum í Faro fyri 14 døgum síðani, skrivar bretska blaðið DailyTelegraph.

Húð- og hárleivdirnar eru nú kannaðar, og rannsóknarstovan fann DNA, sum lutvíst samsvarar við DNA hjá Madeleine McCann.

Talsmaðurin hjá McCann-hjúnunum, Clarence Mitchell, vil ikki gera nakrar viðmerkingar til tíðindini úr Portugal, men ein vinmaður hjá hjúnunum sigur við Daily Telegraph, at Kate og Gerry McCann eru fegin um tíðindini.



*Nú er kanska enn eitt spor komið í málinum um Madeleine McCann*

- Hetta vísir eftir teirra tykki, at tann, sum burturflutti Madeleine, tveitti hesi klæðini frá sær á vegnum úr Pria Da Luz, sigur vinmaðurin við blaðið.

## Russland njósnast líka illa sum gamla Sovjetsamveldið

**Bretar brúka so nógva orku til russiska njósning, at tað órógvar bardagan ímóti yvirgangi**

- Tey flestu halda, at russar góvust at njósnast, tá Sovjetsamveldið datt sundur, men veruleikin er, at Russland njósnast líka illa nú, sum Sovjetsamveldið gjørdi undir kalda krígnum.

Tað sigur tann nýggi ovastin fyri bretsku mótnjósningini MI5, Jonathan Evans, sum tó leggur afturat, at tað eru ikki bara russar, sum njósnast í Bretlandi. Kina og onnur lond gera tað sama, sigur hann.

- Sjálvt um tjúgu ár eru liðin, síðani kalda kríggið endaði, noyðast vit framvegis at brúka nógva orku og nógvar pengar til at verja land okkara ímóti útlendskari njósning, sigur Jonayhan Evans.

Men MI5 fæst ikki bara við russiskar og aðrar útlendskar njósnarar. Jonathan Evans sigur, at mótnjósningin hevur verið í sambandi við unglingar í 15 - 16 ára adri, sum hava verið uppi í ætlanum um yvirgang. Kanningar hava eisini avdúkað, at fleiri yvirgangsfelagsskapir liggja framvið at fáa ungfólk at fremja yvirgang.




*Jonathan Evans tók við sum ovasti í bretsku mótnjósningini í vár*



## Tað skeiva er ikki tað skeivasta

Skeiva tornið í Pisa er ikki tað skeivasta tornið í heiminum longur, tí sambært metbókini hjá Guiness hellir eitt torn í einari lítlari týskari bygd uppaftur meiri enn tað í Pisa. Hallið á torninum í Pisa er 3,97 stig, men tað í teirri týsku bygdini hellir 5,19 stig. Tað skeiva tornið í Týsklandi er bygt í 1450, og hóast tað hellir nógv, verður tað dúgliga vitjað av ferðafólki.

### STUTT SAGT

## Løgreglan skuldsett fyri morð

Mannarættindanevndin í Kenya hevur illgruna um, at ein partur av virkseminum hjá landsins løgreglu er uttan fyri lógarinnar mark. Í einari frágreiðing verður víst á, at teir seinastu mánaðarnar eru umleið 450 lík funnin í trimum av landsins størstu býum, teirra millum høvuðsstaðnum Nairobi. Tey deyðu eru skotin í nakkan við einum skoti. Nevndin hevur tengt løgregluna at morðunum, men leiðslan í løgregluni vísir skuldsetingini aftur og sigur tey vera púra burturvið. Kanningar vísa, at tey umleið 450 fólkini vórðu myrd í tíðarskeiðinum frá juni til oktober.

## Taka kjarnorkuverk sundur

Eftir avtaluni millum Norðurkorea og fimm onnur lond eru amerikanskir serfrøðingar farnir undir at taka eitt ein part av tí størsta kjarnorkuverkinum í Norðurkorea sundur. Eftir avtaluni millum Norðurkorea, Suðurkorea, USA, Kina, Russland og Japan skulu amerikonsku serfrøðingarnir skipa so fyri, at kjarnorkuverkið í Yongbyon verður ónýtiligt tað fyrsta árið, og at londini í tí tíðarskeiðinum fáa teir seinastu smálutirnar í avtaluni frá hondini. USA og Suðurkorea hava lovað Norðurkorea búskaparligan stuðul, um landið eisini heldur tann partin av avtaluni, sum sigur, at landið skal sleppa sínum plutonium og kjarnorkuvápnum næsta ár.

## Ráðharri kravdur frá

Í Kuwait hevur tjóðartingið kravt, at oljumálaráðharrin, Bader al-Humaidhi, skal leggja frá sær, tí tingið er ikki nøgt við hansara embætisførslu, skrivar AFP. Um vikuskiftið sendi kuwaitiski leiðarin, Sheikh Nasser al-Mohammad al-Sabah, boð eftir ráðharranum og kunnaði hann um støðuna. Roknað verður við, at oljumálaráðharrin fer at gera eftir kravinum frá tinginum.